# Óli fær nýggjan venjara

*Peter Rudbæk fer úr venjarastarvinum í AGF beinanvegin í staðin fyri um eitt hálvt ár*

Tað hevur verið nógv tosað og skrivað um, at felagið hjá Óla Johannesen, AGF, hevur havt stórar trupulleikar at finna ein nýggjan venjara. Men sambært Århus Stifttidende í gjár, so verður tað almannakunngjørt í dag, at felagið hevur skift venjara.

Nýggi venjarin eitur Ove Christiansen. Hann hevur áður verið venjari hjá Viborg. Síðsta heyst ljóðaði, at hann skuldi venja danska U-18 landsliðið, men nú ljóðar, at venjarin og AGF hava havt samráðingar um samstarv síðani eina ferð síðsta heyst.

At tað hevur verið tosað so nógv um trupulleikar hjá AGF at finna nýggjan venjara, kemst m.a. av, at felagið fyrst boðaði frá, at navnið á nýggja venjaranum skuldi koma fram á eykaaðalfundinum, ið var 7. desember. Tá varð eingin venjari nevndur, men so varð sagt, at navnið skuldi koma fram á tíðindafundi, ið var ásettur at vera 28. desember. Tann fundurin varð avlýstur, og tað ljóðaði ikki heilt sannførandi, tá orsøkin varð søgd at vera sjúka.



*Óli Johannesen og liðfelagirnir í AGF fáa longu nú nýggjan venjara. Ætlanin var annars, at Peter Rudbæk, sum hevur vant liðið seinastu árini, skuldi vera venjari hetta kappingarárið út, men nú tekur fyrrverandi Viborg venjarin, Ove Christiansen við stýrisvølin í kreppurakta felagnum*

**Fer til AaB**

At tað yvirhøvur var neyðugt hjá AGF at finna nýggjan venjara komst av, at Peter Rudbæk, sum síðsta summar syrgdi fyri, at Óli Johannesen kom í stóra felagið í Århus, fyri langari tíð síðani hevur skrivað sáttmála við AaB.

Ætlanin var, at venjarin, sum føroysku venjararnir, ið vóru á Danmarkarferð í oktober, vóru saman við, skuldi fara úr starvinum í Århus komandi summar, tí hann skal taka við starvinum í Aalborg 1. juli, men nú sigst, at avgerð er tikin um, at Peter Rudbæk hevur havt sín síðsta ar beiðsdag í AGF, og at Ove Christiansen fer at standa við róðrið, tá Óli Johannesen og liðfelagarnir nú fara undir fyrireikingarnar til seinnu hálvu av landskappingini.

Setningurin hjá nýggja venjaranum verður í fyrstu atløgu at syrgja fyri, at stóra felagið í Århus við føroyska íslettinum varðveitir plássið í bestu deildini. Tvey lið flyta niður úr superliguni. AGF er fjórði aftast. Teir hava átjan stig, og tað er fýra fleiri enn Esbjerg, sum er næstaftast.

jh

# FSF fund í februar

*Altjóða samstarvið skal fáast uppá pláss, áðrenn tað ber til at leggja heimligu kappingarnar*

Í gjár kom skriv frá Fótbóltssambandi Føroya um, at aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinum leygardagin 19. februar ár 2000, klokkan 10.00 stundisliga.

Skráin er sambært ásetingunum, og FSF sigur í skrivinum, at mál, sum viðvíkja kappingarreglunum fyri fótbólt, skulu sendast sambandinum í seinasta lagið 19. januar. Mál, sum viðvíkja ásetingunum fyri Fótbóltssamband Føroya, skulu vera FSF í hendi í seinasta lagið 5. februar.

Umframt málini, sum nevndin í FSF og feløgini møguliga leggja fyri fundin, verður á skránni ársfrágreiðing, framløga av grannskoðaðum roknskapi, og val av nevndarlimum og grannskoðarum.

Fyri vali til nevndina í FSF standa hesa ferð formaðurin, Torleif Sigurðsson, og nevndarlimirnir Dánjal Andreasen, Jákup Simonsen og Karl Vidtfeldt.

Síðani FSF varð stovnað 13. januar í 1979, hava aðalfundirnir altíð verið í januar. Tað hevur staðið í ásetingunum fyri Fótbóltssambandið. Aðalfundurin í fjør broytti ásetingarnar, soleiðis at aðalfundurin skal vera í januar ella februar, og hesa ferð verður fundurin altso 19. februar.

**Undankappingin uppá pláss fyrst**

Á aðalfundinum plagar skráin fyri landskappingarnar at verða løgd fram, og lutakastið fyri steypakappingarnar plagar eisini at vera á fundinum. Frá FSF hevur áður verið sagt, at tað fer ikki at bera til at leggja endaligu skránna fyri landskappingarnar og steypakappingarnar í ár 2000, fyrrenn tað er greitt, hvussu skráin fyri HM undankappingina fer at síggja út.

Tann spurningin er ætlanin at avgreiða fríggjadagin 21. januar. Tá fara Allan Simonsen, Jens Erik Magnussen og Ísak Mikladal til Zürich at fundast við umboð fyri hini londini, sum Føroyar eru í HM undankappingarbólki saman við (Jugoslavia, Russland, Sveits, Slovenia og Luksemburg). Oftast plagar tað at ganga skjótt fyri seg at fáa ta skránna upp á pláss, og um tað fer at gangast á sama hátt hesa ferð, so átti møguleiki at veri hjá FSF at lagt skránna fyri steypa– og landskappingarnar fyri feløgini á aðalfundinum.

Í fjør varð fyrsta innleiðandi umfarið í kappingini um løgmanssteypið spælt 14. mars, og tað varð farið undir bólkaumfarið 28. mars. Í fjør fóru kvinnurnar undir steypakappingina 5. apríl. Í fjør varð sjøtul settur á landskappingarnar hjá ávikavíst monnum og kvinnum 25. og 30. apríl.

jh



*Formaðurin í fótbóltssambandinum, Torleif Sigurðsson, er millum teirra, sum nú standa fyri vali á aðalfundi FSF's*




## Skrivstovustarv

Vegna eitt av viðskiftafólkum okkara, eitt fakfelag við skrivstovu í Tórshavn, verður søkt eftir skrivstovufólki at byrja 15.01. ella 01.02.2000.

**Arbeiði:**
- skrivaraarbeiði
- taka telefon
- journalisering
- arkivering
- annað fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni

**Førleikakrøv:**
- skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- køn/kønur í rættskriving og norðurlendskum og enskum máli
- royndir innan EDV
- royndir frá skrivstovuarbeiði

**Setanartreytir:**
- sambært avvarandi sáttmála

**Umsóknarfreist:**
- hin 10.01.2000
- við umsóknini skulu sendast avrit av próvskjølum og møgulig viðmæli.

Áhugaði kunnu við at venda sær til Páll Nielsen fáa nærri upplýsingar um nevnda starv.

**Advokatvirkið**
**Páll Nielsen - Sigmund Poulsen**
**Hoyvíksvegur 27**
**Boks 85 • 110 Tórshavn**
**tlf. 312171 - telefax 318574**
**teldupostadressa:**
**advokat@post.olivant.fo**

## Frá Hotel Föroyum

Tilboð ynskist at hampa um grótgarðin á ognini hjá Hotel Föroyum.

Áhugaðir biðjast seta seg í samband við

**Tlf. 317500**

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## Regluligu býráðsfundirnir hjá Runavíkar býráð í ár 2000

verða hesar dagar kl. 17.30 í býráðshøllini: 27/01 - 24/02 - 30/03 - 27/04 - 30/05 - 29/06 - 31/08 - 28/09 - 26/10 - 30/11 og 21/12.

Býráðsskrivstovan er opin kl. 10-12 og 13-15.

Býráðsformaðurin er at hitta eftir avtalu.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi 14 dagar áðrenn fundin.




**Runavíkar býráð**

## Frá Hotel Föroyum

Tilboð ynskist at innhegna ognina hjá Hotel Föroyum og gerð av rulluportri við omankoyringina frá Oyggjarvegnum.

Áhugaðir biðjast seta seg í samband við

**Tlf. 317500**

## ØLL LUFTAMBOÐ og ÚTGERÐ fæst frá okkum




- *Kompressarar, nýggir og brúktir*
- *COBRA motorborimaskinur*
- *Borihamarar*
- *Brekkarar*
- *Smyrjiapparat o.a.*
- *Borstál, t.d. borar, meitlar, borkrónur o.a.*
- *Luftslangur, koblingar, klemmur o.a.*

*Vit útvega eykalutir til flestu kompressarar og luftamboð*

**Kaj Andreasen Pf.**
*Sandvíkarhjalli - Tlf. 315600 - Fax 318008*

## Aðalfundur

Aðalfundur Fótbóltssamband Føroya, verður í Norðurlandahúsinum, Tórshavn, leygardagin, 19. februar 2000, kl. 10.00.

Fundarskrá sambært lógunum.

**Fótbóltssamband Føroya**
The Faroe Islands´ F.A.
Member of FIFA - UEFA - ÍSF

## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**

## Frá Filmseftirlitinum

**til øll, ið selja ella útleiga videofilmar og aðrar filmar**

Filmseftirlitið minnir á, at øll - bæði einstaklingar og feløg, ið selja og/ella útleiga filmar, videofilmar, DVD o.l. hava sambært løgtingslóg **skyldu** til:

- at lata seg **skráseta** hjá Filmseftirlitinum
- at lata Filmseftirlitið **góðkenna** allar videofilmar og aðrar filmar, áðrenn hesir verða seldir og/ella útleigaðir
- at lata Filmseftirlitið **góðkenna og seta** sítt stempul á reklamumyndir, ið verða vístar móti almennum vegi ella í hølum, sum almenningurin hevur atgongd til.

Brot á hesar reglur verður revsað við bót, og eisini er heimilað tollvaldinum at sýta at avgreiða óskrásettar innflytarar.

Omanfyri nevndu viðurskifti kunnu fáast í rættlag við at venda sær til Filmseftirlitið á tlf. 317344 gerandisdagar millum 13-16 (fax 319330 ella e-mail: filmseft@post.olivant.fo)

**FILMSEFTIRLITIÐ**
**Postsmoga 124**
**N. Winthersgøta 7**
**FO-110 Tórshavn**